## Øðrvísi bindisnið í Norðurlandahúsinum



DK:KNIT er heitið á framsýning við bindisniðum, sum letur upp fríggjadagin í Norðurlandahúsinum. Tað er Kolding Designskole, sum hevur tikið stig til framsýningina. Við á framsýningini eru 11 sniðgevar, m.a. føroyska Katrina í Geil, sum hevur tikið útbúgving frá Kolding Designskole.Umframt bundin pløgg verða eisini ymiskir lutir sýndir fram, sum vit her heima kanska ikki seta í samband við binding. Her er gott høvi hjá øllum, ið hava áhuga fyri sniðgeving og binding at fáa íblástur. Kurator av framsýningini er Helene Jensen, ið dagliga starvast á Kolding Designskole. Fernisering verður fríggjadagin 6. mars klokkan 17. Framsýningin er opin til og við 14. apríl.

## Tingmenn bóðu um umbering

Í íslendska Altinginum kjakaðust fólk í gjár um bankakreppuna, og sum vera man kom kjakið inná, hvør hevði ta politisku ábyrgdina av tí, sum hendi íslendska fíggjarkervinum. Ástu Möller úr Sjálfstæðisflokkinum segði seg eiga sín part av ábyrgdini, og Mörður Árnason úr Samfylkingini bað um umbering fyri, at hann ikki hevði funnist nóg mikið at oddamonnum floksins. Sigurður Kári Kristjánsson úr Sjálfstæðisflokkinum vísti á, at fleiri leiðandi politikarar í hansara flokki hava tikið avleiðingarnar, men hann helt, at tað kann ikki sigast um oddafiskarnar í Samfylkingini, sum tvørturímóti sita í stjórn enn, helt hann.




*Í døgunum 23. – 27. mars hava føroyskir skúlanæmingar í 9. flokki tveir tímar at svara umleið 26 spurningum, og síðani 45 minuttir at svara persónligum spurningum. Sama mannagongd er í øllum teimum 62 luttakaralondunum.*

# Skúlabørn leggjast á PISA-vektina

**Um tvær vikur skulu allir næmingar í 9. flokki í Føroyum til PISA-kanning. Hesaferð verður høvuðsdenturin lagdur á lesing. Men aðrir førleikar verða eisini kannaðir**

UNDIRVÍSING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sjokkið aftan á seinastu PISA-kanning hevur nóg illa lagt seg, nú føroyskir skúlanæmingar í 9. flokki aftur skulu samanberast við ungdómar í øðrum londum. Sum vanligt verður høvuðsdenturin lagdur á eitt serligt evni. Seinast vóru tað náttúrulærugreinir, og hesaferð verður høvuðsdentur lagdur á lesiførleikan hjá næmingunum.

Seinasta PISA kanningin var í 2006, og tá endaði Føroyar á einum syndarligum botnplássi millum tey 57 londini, sum tóku lut. Bara skúlaverkið í Meksiko var verri fyri enn tað føroyska.

Nú luttaka 62 lond og aftur hesaferð er Mentamálaráðið, sum skipar fyri kanningini. Í hvørjari kanning verður trý øki kannað, lesing, støddfrøði og náttúrulærugreinir. Eisini verður bakstøðið næminganna kannað, eitt nú viðvíkjandi skúlagongd, kyn, familjustøðu, frítíðarvirksemi og hugburði til skúlagongdina.

Í tilfari, sum Mentamálaráðið hevur framleitt, verður sagt, at kanningin skal fáa í ljósmála førleikatøðið í Føroyum, so til ber at fremja tiltøk, ið skulu gera næmingarnar betri førar fyri at klára seg í einum meiri altjóðagjrdum heimi.

Eisini verður sagt, at kanningin varpar ljós á, hvussu tey ungu duga at nýta eina vitan, tey hava ognað sær í undirvísingini, ella hvussu tey ungu ítøkiliga duga at nýta vitanina, tá ið ein uppgáva skal loysast. PISA varpar sostatt ikki ljós á innialdið í lesiætlanunum í einstøku londunum.

Tá úrslitið av PISA-kanningini fyriliggur, ber eisini til at lesa, hvussu næmingarnir eru fyri í mun til tilfeingisnýtslu og undirvísingarumstøður annars. Úrslitið av kanningini mars 2009 verður kunngjørt í desember 2010.

### Visti tú…

..at londini, sum higartil hava verið við í PISA kanningini, fevna um á leið 90 prosent av heimsbúskapinum?

**Les meira á:**

www.pisa.oecd.org
www.oecd.org/media
www.oecd.org/publications
www.oecd.org/statistics

### FAKTA

PISA (Programme for International Student Assessment) er ajtóða kanning, sum mátar førleikar, ið serfrøðingar í OECD-longunum halda vera grundleggjandi og neyðugar fyri, at einstaki borgarin megnar at taka av teimum avbjóðingunum, sum vitanarsamfelagið setur. Sagt verður, at uttan eitt høgt førleikastøði ber ikki til at fremja búskaparligan vøkstur, ið aftur er við til at skapa sosiala menning.

AÐALSTJÓRI TIL
ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Les meira á www.tinganes.fo




LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office